# Nógvir fyrimunir við gransking í Føroyum

**Millum teirra, ið løgdu fram á BitTinginum um ílegugransking, vóru danski professarin, Torben Kruse, og vágbingurin Hans Atli Dahl, ið báðir arbeiða innan ílegugransking á Odense Universitets Hospital**

ÍLEGUGRANSKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Torben Kruse greiddi frá, at hansara lið av granskarum heilt avgjørt hevur áhuga í at granska í føroyskum ílegum. Teir hava áður saman við eitt nú August G. Wang, sálarlækna, granskað í føroyskum ílegum, og data frá hesi kanning eru í dag tøk. Talan var um eina verkætlan, sum á donskum bar heitið "Identifikation af sygdomsgener af betydning for udviklingen af psykiatriske sygdomme i den færøske befolkning". Talan var um eitt danskt-føroyskt samstarv, ið bleiv kallað Føroya-projektið.



*Torben Kruse, professari, og Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland, á BitTinginum um ílegugransking á Hotel Føroyum fríggjadagin.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Ógvuliga konsentrerað fólkaslag

Hans Atli Dahl segði, at ein av stóru fyrimununum hjá føroyingum er, at føroyska fólkið er ein ógvuliga "isolera population", og við teimum ættarbandsligu upplýsingum, sum finnast, er tað rættuliga lætt í mun til aðrastaðnis at finna fram til, hvagani eitt sjúkugen møguliga stavar í eini familju. Eisini liva vit føroyingar undir ógvuliga einsháttaðum umhvørvisligum ávirkanum. Hinvegin hava vit sera avmarkaðan kunnleika og førleika innan ílegugransking í Føroyum.

Royndirnar hjá granskunum við Føroya-projektinum vístu eisini, at teir í fleiri førum høvdu staðfest, nær og hvussu eitt sjúkugen var komið inn í eina familju. Hetta hava granskarar eisini megnað aðrastaðnis í smáum og avsíðis liggjandi samfeløgum, men av tí at vit í Føroyum eru vesturlendingar, hava vit ein fyrimun í mun til fleiri av hinum, tí talan er um fjarskotin samfeløg við fólki av øðrum uppruna enn vesturlendskum.

Sjálvur hevur Hans Atli Dahl granskað í mannaílegum, síðani hann tók prógv innan øki í 1997. Á BitTinginum segði Hans Atli eisini, at eftir hansara tykki eru tað góðir møguleikar fyri ílegugransking í Føroyum.

– Um tað hevði verið møguleika fyri at granska í Føroyum, tá ið eg bleiv liðugur at lesa, so hevði eg flutt heim tá. Men tað vóru tað ikki og eru tað framvegis heldur ikki. Eg haldi tó, at tá ið karmarnir eru lidnir, so finnast nógvir føroyingar, ið hava áhuga í at granska. Tað eru kanska ikki so nógvir, ið her og nú kunnu fara undir at granska, men fleiri ungir føroyingar lesa innan hetta øki, segði Hans Atli Dahl.

---

# Navigator á veg heim við fullari last

**Marknaðurin fyri surimi er góður og støðugur. Ein helmingur av framleiðsluni hjá Atlantic Navigator fer til Japans, og hin helmingurin verður seldur í Evropu**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Risatrolarin, Atlantic Navigator, er á veg til lands við fullari last, 1200 tonsum av surimi og 300 tonsum av mjøli. Teir fóru avstað, 18. januar og byrjaðu at fiska 20. januar.

Hetta er ein góður túrur hjá skipi og manning – ikki minst, tá ið havt verður í huga, at skipið er umbygt og ikki fór á fyrsta túrin fyrr enn stutt fyri jól.

### Plattalast

Atlantic Navigator tekur undir vanligum umstøðum eini 1600 tons í lastini, men nú vøran stendur á plattum, tekur lastin nøkur hundrað tons minni. At framleiðslan fer í lastina á plattum, ger tað ómakaleysari at fáa vøruna niður, og tá ið landað verður, er eisini skjótari at fáa framleiðsluna upp úr aftur skipinum.

Mánakvøldið hevði Atlantic Navigator 1158 tons av surimi í lastini, og tá var manningin ikki liðug at framleiða.

So væl hevur gingið at fiskað hendan túrin, at manningin stundum hevur brotið vakt, soleiðis at fiskurin kundi fáast undan. Tá ið mest hevur verið at gera, hevur manningin brotið vakt triðja hvønn dag.

Sum skilst, hevur fiskurin verið hampiliga góður, men nú til várs gýtir svartkjafturin, og tá gerst hann meira rak.

### Góður marknaður

Atlantic Navigator leggur veiðina upp í Ánunum, har hon fer í bingjur og síðan av landinum.

Væntandi er, at tað fer at taka einar tveir dagar at leggja veiðina upp og gera skipið klárt aftur til nýggjan túr.

Skipari hendan túrin var Lion Petersen, og nú farið verður avstað aftur seinni í vikuni, stendur Brandur Nólsoy á brúnni.

Sum skilst, er marknaðurin fyri surimi góður og støðugur. Ein helmingur av framleiðsluni hjá Atlantic Navigator fer til Japans, og hin helmingurin verður seldur í Evropu.

Surimi verður framleitt og selt í tilsamans fimm sorteringum eftir dygd.



*Atlantic Navigator hevur gjørt ein góðan túr, 1200 tons av surimi og 300 tons av mjøli*
*Mynd: Dávur Winther*